

*Stríðsviljin sýndi seg enn einaferð sum sterkasta vápnið hjá føroysku flogbóltsharrunum, sum snøgt sagt noktaðu at geva seg móti Álandi*

Føroyar-Áland 3-1 (22-25, 25-13, 31-29, 25-18):

# Fightaðu Áland niður

**Seks ferðir á rað høvdu álendingar settbólt í triðja settinum, men okkar hildu fast. Og so knekkaði mótstøðan seinastu løtuna**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

Lerwick: Tað eru sjáldan stundir at hugsa seg ov nógv um, ella at skola vónbrotini burtur, tá kappast verður í ítrótti. Júst hetta er eisini orsøkin til, at sálarliga javn- ella yvirvágin hevur so nógv at siga.

Eftir tvey sett, har talan var um skiftandi yvirvág, gjørdist talan í triðja settinum um ein veruligan bardaga, har sálarliga yvirvágin skuldi vinnast. Hesa tóktist Áland hava fingið, tá teir móti endanum stríddu seg framum. Við framúr libero-spæli frá Johan Petur á Stongum og eini noktan móti at geva seg eydnaðist tó okkara at halda fast. Seks settbóltar á rað yvirlivdu okkara, og so orkaði Áland ikki meira. Í sjeyndu royndini vóru tað okkara, sum fingu fyrimun, og tá Bartal Eliasen og Jón Nielsen blokkaðu álendska smashið í gólvið, kundi sigurin tað sama verið skrivaður til okkara.

Tí í veruleikanum, so var Áland nú niðri. Sálarliga megnaðu teir ikki at toga seg uppaftur, meðan okkara hinvegin mest sum vóru flúgvandi. Adrenalin-rúsurin sat í kroppinum á hvørjum spælara. Móttøkurnar sótu perfekt, soleiðis at Bárður B. Mikkelsen fekk góðar arbeiðsumstøður sum hevari, og so kundu kantarnir av álvara gera um seg. At munurin ikki var meira enn sjey bóltar, komst fyri ein stóran part av, at okkara í nógvum førum satsaðu meira, enn gott var, nú sigurin kortini var heima. Hetlendski hallarvarparin, sum ivaleyst kennir seg sum hálvan føroying eftir leikirnar, geylaði støðugt á føroysku fjøldina, og hóast klokkan var um vera nógv, so var kortini rúm fyri klappsalvum, tá dysturin var lokin. Føroyska manslandsliðið hevði enn einaferð prógvað, at stríðsviljin er í toppi, og lønin er eitt pláss móti Bermuda í hálvfinaluni. Eitt mótstøðulið, sum tykist heldur meira yvirkomulig enn Saaremaa, sum aftur í ár tykjast sera sterkir.

## Gott at koma ígongd

**Lerwick:** Tá vit eftir dystin í fingu orðið á føroyska liðskiparan, Rúna Weihe, tóktist hann vera sera fegin um, at føroyska liðið nú veruliga hevði staðið eina styrkisroynd.

- Tað kanst tú ætla. Spælið higartil hevur verið sera svingandi, og ikki minst hava spælt móti tveimum sera veikum liðum. Tá fært tú ikki víst, hvat tú stendur fyri, men tað megna vit væl í dag.

Tað tykist eisini, sum fara tit ongantíð heilt niður í dystinum, hóast tað sjálvandi gongur upp og niður. Er tað ikki eitt tekin um eitt høgt botnstøði.

- Jú. Sjálvt tað settið, sum vit taptu, taptu vit tepurt, meðan vit hinvegin vunnu sannførandi í øðrum og fjórða settið. So samanlagt haldi eg, at vit eru øgiliga væl nøgdir.

Tá tú vinnur eitt sett sum hatta triðja, har tit yvirliva seks settbóltar. Gevur tað so ikki eina ótrúliga sálarliga styrki til næsta settið.

- Jú, motivatiónin er í øllum førum til staðar tá. Og tú trýrt uppá, at tað letur seg gera. Og tað prógvaðu vit eisini.

Eina løtu í dystinum tóktist vandi vera fyri, at Rúni enn einaferð mátti geva skarvin yvir móti ryggskaðanum, sum so ofta hevur plágað. Hann noyddist út á beinkin at sita, men sjálvur helt Rúni ikki, at talan var um álvarsligan skaða.

- Eg spældi ikki við hasum ryggbeltinum, sum eg eigi at nýta. Eg merkti einki undir upphitingini, og so roknaði eg við, at tað fór at ganga. Men tað gjørdi tað so ikki.

Og var so alt í lagi, tá beltið var komið á.

- Ja, stórt sæð. Eg skuldi líka brúka einar fimm bóltar, men so merkti eg einki. Og eg kláraði í øllum førum at smasha nakrar ferðir!

**-jm**

Føroyar-áland 3-0 (25-22, 25-23, 25-14):

# Loksins nakað av mótstøðu

**Føroysku kvinnurnar fingu eitt slag av styrkisroynd móti Álandi. Og sambært liðskiparanum, so liggur størsta styrkin í breiddini á hópinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Eins og í undanfarnu dystunum í bólkaspælinum, so vunnu føroysku flogbóltskvinnurnar ein tryggan 3-0 sigur. Men í dystinum móti Álandi fingu okkara tó nakað av mótstøðu. Og tí kundi hesin dysturin kanska eisini brúkast til at meta um formin hjá føroyska liðnum, helt liðskiparin, Herborg á Mýruni.

- Eg haldi, at spælið er vorðið betri og betri fyri hvønn dyst. Men tað gevur nakað av nervum, tá tú ikki veitst, hvussu hini eru fyri. O tað haldi eg eyðkendi bæði liðini í dag. Bæði tær og vit hava skift nógv út í mun til seinast, og tað gevur nakað av ótryggleika.

Hálvfinalan verður allar helst ímóti Jersey. Hava tit sæð tær spælt nakran dyst?

- Vit hava sæð tær, men eg haldi slettis ikki, at vit eru serliga bangnar fyri teimum. Vit taka ein dyst í senn, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur.

Tit eru ikki farnar at hugsa um eina finalu móti Saaremaa enn?

- Nei. Tað gera vit ikki. Sjálvandi hevur tú vónir um at koma í finaluna, tá tú hevur vunnið tríggjar sigrar á rað, men tað ræður framvegis um at taka ein dyst í senn.

Hava tit so heldur ikki hugt at Saaremaa?

- Jú. Tað hava vit. Tær eru nokk á sama støði, sum tær vóru fyri tveimum árum síðani, men eg haldi ikki, at tær hava so nógvar møguleikar fyri útskifting. Higartil hava tær spælt tríggjar dystir mest sum uttan at skifta út, og tær, sum sita á beinkinum, tykjast ikki vera so sterkar.

### Breiddin er styrkin

Og júst hetta heldur Herborg eisini vera størstu styrkina hjá føroyska liðnum.

- Vit hava kanska ikki so sterkar einstaklingar, sum vit hava havt. Men vit hava ein sera breiðan og javnt sterkan hóp. Byrjar onkur at møðast, so kann ein eins góð setast inn uttan stórvegis trupulleikar, og tað er avgjørt ein styrki.

So tit hava kanska einki ímóti, at talan enn einaferð verður um ein fimm-settara í finaluni, uim tit koma so langt.

- Nei. Vit eru í góðum formi, so tað skuldi ikki gjørt nakað. Vit hava vant regluliga í longri tíð, og seinastu tvær vikurnar undan oyggjaleikunum hava vit vant hvønn dag. So tann parturin skuldi verið klárur.



*Enn vilja føroysku kvinnurnar ikki tosa um Saaremaa, men tað er lítið at ivast í, at finalan aftur í hesa ferð fer at verða ein endurtøka. Og Herborg sigur seg einki hava ímóti, um talan enn einaferð verður um fimm-settara*